# Vágbingar spældu alla tíðina

***Løgmanssteypið:** Toftamenn vóru ikki vaknaðir, tá VB setti hol á, og toftamenn svóvu, tá vágbingar í síðstu løtu avgjørdu*



*Juguslavirnir royndust betri enn brasiliumenninir, tá VB sunnudagin sendi B68 úr steypakappingini*
***Mynd: J. Jacobsen***

B68-VB 1-3 (0-1)

Vágbingar hava eitt fínt fótbóltslið. Tað hava vit fleiri ferðir sagt áður, og sunnudagin staðfestu teir tað á Svangaskarði. Serliga er tað í álopspartinum, at VB, sum hesa ferð mátti spæla uttan Tórða Holm á miðvøllinum (Jón Gærdbo, sum ikki hevur verið við síðani steypadystin móti NSÍ í Vági, loysti av), er væl fyri, og tað vóru menninir í fremstu røð, sum høvdu avgerandi orðið at siga, tá VB megnaði at spæla seg í hálvfinaluna í kappingini um løgmanssteypið.

Toftamenn snorksvóvu, tá álopsmenninir hjá VB vóru fyrstu ferð upp á spæl. Teir spældu upp á tvørs í miðverjuni, Robert Cieslewicz kom ímillum, var skjótur móti málinum og sendi framvið Magnusi Poulsen.

1–0 til VB. Sekundvísarin hevði gingið 21 sekund, og fyritreytirnar hjá gestunum vóru av teimum allar bestu.

VB venjarin plagar at siga, at hansara lið hevur ikki somu dygdir at spæla verjukent sum at spæla álopskent. Tað hevur hann kanska rætt í, og tí var tað ikki eftir høvdinum hjá vágbingum, at teir tað mesta av tíðini vóru á egnari hálvu. Heldur var tað tí, at teir vóru kroystir til tað.

Men hvassa álopið hjá VB var alla tíðina vandamikið, og sjálvt um B68 hevði bóltin mest, so vóru tað VB álopini, sum tað var mest tyngd í. Milan Kuljic, Jón Pauli Olsen, Robert Cieslewicz og Krzysztof Popczynski duga nógv við bóltinum, og teir finna væl saman.

Tað var fleiri ferðir nær við og næstan, at teir fingu mál tvey mál í 2. hálvleiki. Í 67. minutti legði Jón Pauli Olsen VB framum 2–1. Skjótt álop í vinstru og tvær skotroyndir, sum Magnus Poulsen hevði hálvbjargað, skulu til, áðrenn miðvallarin í triðju atløgu skoraði. Og fram móti dystarenda, tá B68 royndi at javna og tískil hevði nógv fólk frammarlaga, var Robert aftur uppá spæl.

**Lítil úrtøka**

Toftamenn, sum hesa ferð aftur høvdu Súna Fríða Johannesen sum fremsta mann og enn eina ferð saknaðu Fróða Benjaminsen, høvdu bóltin nógv meiri enn mótstøðumenninir.

B68 hevði 3–5–2 útgangsstøðuna, og Jákup Djurhuus, sum spældi fyri fyrstu ferð í ár, var góður í miðverjuni. Serliga Jákup Eli Olsen, sum var ytstur á miðvøllinum í vinstru, var grammur og legði fleiri fínar bóltar innfyri úr tí borðinum, har vágbingar vóru mest tunnir i verjupartinum.

Men hóast bóltarnir vóru neyvir og lógu væl, og hóast álopsmenninir fleiri ferðir fingu høvi at stúta, so eydnaðist ikki at fáa mál. Neyvleikin var ikki nóg stórur, og tá toftamenn royndu seg við skotum, vísti Bjarni Johansen í VB málinum sínar dygdir.

B68 javnaði í 56. minutti, tá teir fingu eitt tunnt brotsspark. Jón Pauli Olsen royndi at verja bóltin út av vøllinum, eingin vandi var á ferð, toftamenn tóktust ikki halda nakað serligt vera á vási, men linjuverjin veittraði, dómarin bríkslaði fyri brotssparki, og Súni Fríði Johannesen var tryggur úr ellivu metrum.

Súni Fríði Johannesen sneiddi seg leysan, plaseraði bóltin dygst úti við stólpan, men Bjarni Johansen var sum ein køttur yvir bóltinum, og toftamenn komu ikki nærri at skora.

JH

**B68-VB 31-3 (0-1)**
0-1 Robert Cieslewicz
1-1 Súni Fríði Johannesen
1-2 Jón Pauli Olsen
1-3 Robert Cieslewicz

**B68:**
Magnus Poulsen – Jan C. Dam, Arnbjørn Danielsen, Jákup Djurhuus – Kristian Poulsen (Øssur Jacobsen, 46.), Marlon Jorge, Øssur Hansen, Eyðstein Skipanes, Jákup Eli Olsen – Súni Fríði Johannesen, Marcello Marcellino (Jann Ingi Petersen, 79.)

Reytt kort: Jann Ingi Petersen 90.

**VB:**
Bjarni Johansen – Predrag Zivkovic (Eyðun Kjærbo, 71.), Janus Kjærbo, Eyðun Jacobsen, Magni Jacobsen – Petur Óli Samuelsen, Jón Gærdbo (Michael í Lágabø, 71.), Milan Kuljic (Palli Augustinussen, 87.), Jón Pauli Olsen – Robert Cieslewicz, Krzysztof Popczynski

Gult kort: Januks Kjærbo 81.

# Deyðbóltarnir sendu NSÍ úr steypakappingini

***Løgmanssteypið:** Gøtumenn skoraðu tríggjar ferðir í fyrra umfarinum, og so bundu teir fyri*

Søgan endurtekur seg. Tað er ein veruleiki, og sunnudagurin í Sarpigerði var ein staðfesting av, at søgan ikki nýtist at vera so gomul fyri at endurtaka seg.

Í landskappingardystinum dýra biðjudag kostaðu deyðbóltarnir NSÍ øll stigini móti GÍ. Tá NSÍ sunnudagin fór um Gøtueið til enn eina ferð at stríðast móti grannunum – hesa ferð í steypakappingini – høvdu teir bæði tosað um og gjørt nakað ítøkiligt fyri at byrgja uppfyri, at deyðu bóltarnir aftur skuldu kosta nógv, men tað hjálpti lítið ella rættari sagt einki.

Trygvi Mortensen hevði staðiliga mint sínar spælarar á og arbeitt við teimum fyri at sleppa undan óhepnu støðunum, og hann hevði valt at seta Ólav Højgaard í málið, men úrslitið var tað sama.

GÍ skoraði trý mál í 1. hálvleiki, og tvey tey fyrru komu eftir deyðbóltsstøður.

Fríggjadagin og sunnudagin kendist tað næstan sum at GÍ fekk eins stóran møguleika sum brotsspark, tá teir høvdu hornaspark og fríspark í borðunum.

24 minuttir vóru farnir, tá teir settu hol á. Pauli Jarnskor sendi hornaspark úr vinstru og yvir um handara stólpa, har Pól Ennigarð, sum hesa ferð var miðverji, sendi innfyri aftur. Eitt sindur av aftur og fram stóðst av, og Martin Thomsen, sum var í miðverjuni saman við Pól Ennigarð, átti síðsta fótin á. NSÍ vildi hava fríspark, tí teir mettu, at verjumaðurin hevði skumpað fleiri mótstøðumenn burtur, men dómarin lætst ikki um vón.

Í 29. minutti økti GÍ til 2–0, og aftur var talan um deyðbóltsstøðu. Súni Olsen, sum var komin fyri seg eftir skaðan, og sum hesa ferð var hollur sentralur miðvallari, sendi ferðmikið fríspark innfyri úr høgru, Ólavur Højgaard fór úr málinum, men ikki fatur á bóltinum, sum tók í høvdið á Mortani Hansen og fór í netið.

Og í 42. minutti staðfesti Henning Jarnskor sigurin. Helgi R. Petersen sendi góðan diagonalbólt í høgru til landsliðsmannin, sum var blankur og nóg kaldur at sneiða framvið einum mótstøðumanni, áðrenn hann sendi bóltin í kassan. 3–0 til GÍ, og so var einki at spæla um.

**Neyðugar broytingar**

At liðini høvdu spælt fríggjadagin og aftur spældu sunnudagin hevði við sær, at tað var neyðugt at gera fleiri broytingar, tí spælarar vóru ikki komnir fyri seg aftur.

Hjá GÍ var Rúni Justinussen burturfrá bæði fríggjadagin og sunnudagin. Jóan Petur Olsen var ikki tøkur sunnudagin. Súni Olsen megnaði væl uppgávuna á miðvøllinum, og Leivur Hansen var drúgvur á vongverjanum í vinstru í báðum dystunum.

NSÍ stórsaknaði sunnudagin Arnfinn Langgaard, sum heldur ikki var við fríggjadagin, Djóna N. Joensen og Christian Høgna Jacobsen. Teir eru allir skaddir, og tað verður vónað í Runavík, at teir verða klárir, áðrenn teir sunnudagin skulu út á Toftir.

JH

**GÍ–NSÍ 3–0 (3–0)**
1–0: Martin Thomsen 25.
2–0: sjálvmál 29.
3–0: Henning Jarnskor 42.

**GÍ:**
Sunvard Joensen – Áslakur R. Petersen, Pól Ennigarð, Martin Thomsen, Leivur Hansen – Magni Jarnskor, Súni Olsen, Pauli Jarnskor – Henning Jarnskor, Óli Hansen, Helgi R. Petersen

**NSÍ:**
Ólavur Højgaard – Brynjolvur Nielsen, Kári Hansen, Dánial Hansen, Sjúrður Jacobsen – Gert Langgaard, Ian Højgaard, Jan Nónklett, Jónstein Petersen – Sonni L. Petersen, Mortan Hansen



# Teir í Herfølge hava fingið gummibein

*Jákup Mikkelsen og teir iðra seg um, at teir ikki tóku av, tá møguleiki var fyri at økja um frástøðuna til Brøndby*



*Einans tveir dystir eru nú eftir at leika hjá Jákupi og teimum í Herfølge*

Stríðið um danska meistaraskapin í fótbólti er vorðið ein sannur gysari. Munurin millum Herfølge og Brøndby er tann sami, sum hann hevur verið, men Brøndby hevur nú bara tveir dystir at vinna tey trý stigini inn á Herfølge, sum tað er neyðugt hjá teimum at gera, um teir skulu taka DM frá Jákupi Mikkelsen og teimum.

Men samstundis er tað ein veruleiki, at Herfølge sunnudagin hálvklossaði á heimavølli móti OB, og tað var púra óneyðugt:

– Vit høvdu greitt tak á teimum, og tað eigur ikki at koma fyri, at vit sleppa teimum inn aftur í dystin, tá vit miðskeiðis í 2. hálvleiki eru á odda við tveimum málum.

Hetta sigur Jákup Mikkelsen úr Herfølge, og venjarin hjá honum, John Faxe Jensen, roynir at finna orsøkina til, at OB síðsta korterið fekk loyvi at skora tvey mál:

– Tað er ikki tilvitað, men tað tóktist sum um okkara menn høvdu hug at taka seg eitt sindur aftur á vøllin, tá sigurin tóktist vera vísur. Tað skuldu vit ikki havt gjørt. Okkara stílur er at kroysta mótstøðumenninar frammarlaga á vøllinum. Tá teir fingu høvi at koma ígjøgnum í síðunum gjørdist tað vandamikið í brotsteiginum hjá okkum. Okkara spælarar eru ikki vanir at vera so tætt við at vinna DM, so tað kann gott vera, at teir fingu gummibein síðstu løtuna, segði John Faxe Jensen við danskar fjølmiðlar.

**Áttu at bundið um**

Burtursæð frá síðsta korterinum hevði Herfølge fyri tað mesta gott tak á mótstøðumonnunum. Tá tað var hálvleikt stóð á jøvnum 1–1. OB legði bragdliga fyri eftir steðgin, men við eitt skoraði Herfølge, og tá teir miðskeiðis í 2. hálvleiki øktu til 3–1 var fagnaðurin á og kring vøllin øgiligur.

Og so var tað, at gummibeinini gjørdu um seg. OB heilfluktaði framvið Jákupi Mikkelsen til 3–2, og tá tað restaðu fimm minuttir longdu teir innkast úr høgru og inn fyri málið, har eftiransingarnar vóru alt annað enn góðar. Ein av verjuspælarunum vildi hava, at Jákup skuldi havt verið úti og boksað bóltin burtur, men undir øllum umstøðum var tað ein veruleiki, at Herfølge fekk eitt stig burturúr á heimavølli.

**Todi alla tíðina**

Størsta áskoðarafjøldin sunnudagin var í Brøndby, har FCK vitjaði og fekk 1–1 javnleik.

Hjá Herfølge kom tað sjálvandi væl við, at Todi Jónsson og teir syrgdu fyri, at Brøndby ikki kundi eta seg inn á oddaliðið, men samstundis kundu troyttu Herfølge menninir, sum vóru lidnir við sín dyst, áðrenn fyrsta bríkslið í Herfølge, staðfesta, at FCK verður torført at spæla ímóti komandi sunnudag. Todi Jónsson og teir tykjast hava rætta lagið stutt undan kappingarenda, men úrtøkan er framvegis lítil.

Todi Jónsson var við allar 90 minuttirnar. Í 1. hálvleiki var hann miðframherji í 4–3–3 spælskipanini, og í 2. hálvleiki var hann ytstur á miðvøllinum í vinstru. Tá var skipanin 4–4–2. Todi var væl við í samanspælinum, og onkra ferðina var um reppið, at hann megnaði at slíta seg leysan við bóltinum. Brøndby menninir fingu tvey gul kort fyri at fella føroyska álopsmannin.

Norðmaðurin Harald Brattbakk setti hol á fyri FCK, og fyri hálvleik javnaði sviin Mattis Jonsson. Í 2. hálvleiki var FCK leikliga omaná. Serliga var tað myrki Zuma, sum var framúr, men teir fingu einki mál. Brøndby hevði fleiri góðar møguleikar, men FCK málverjin, Karim Zaza, sum er á veg burtur frá felagnum, stóð sera væl.

**AaB burturúr**

Sunnudagin varð tað greitt, at meistarastríðið verður bara millum Herfølge og Brøndby. AaB varð avhølvað 7–2 í Viborg, og nú eru teir smokkaðir so mikið burtur ímillum, at alt bendir á, at Herfølge í hvussu so er fær silvurkrónurnar.

Silkeborg, sum hevur verið mett sum møguligt evni til medaljurnar, var ikki væl upplagt í Lyngby, har tað endaði 0–0. AB hevur eisini havt medaljur at spæla fyri. Teir megnaðu ikki meiri enn 2–2 í Århus. Felagið hjá Óla Johannesen er framvegis hótt av niðurflyting, men dumpiplássini vóru í gjár framvegis hjá Vejle og Esbjerg, sum hittust í gjárkvøldið.

Komandi hóskvøld verður sannur spenningur í. Tá skal Herfølge spæla í Silkeborg, og Brøndby skal spæla í Gladsaxe móti AB. Sjónvarpsrásin TV3+ fer at senda beinleiðis frá báðum dystunum. Tann sendingin byrjar klokkan 17.30, og tveir tímar seinni verður greitt, um tað framvegis verður spenningur um meistaraskapin, tá FCK sunnudagin fer at vitja í Herfølge. Tá skal Brøndby spæla á heimavølli móti vónbrotna AaB.

JH



Todi og teir góvu Herfølge eina hjálpandi hond, tá teir tóku stig frá Brøndby

**Úrslit, superligan**

| | | |
|---|---|---|
| 21.05 | Brøndby-FC København | 1-1 |
| 21.05 | Lyngby-Silkeborg | 0-0 |
| 21.05 | AGF-AB | 2-2 |
| 21.05 | Herfølge-OB | 3-3 |
| 21.05 | Viborg-Aab | 7-2 |
| 22.05 | Vejle-Esbjerg<br>Leiktur eftir evstamark | |

**Komandi dystir:**

| | |
|---|---|
| 25.05 | Viborg-Vejle |
| 25.05 | Aab-AGF |
| 25.05 | AB-Brøndby |
| 25.05 | FC København-Lyngby |
| 25.05 | OB-Esbjerg |
| 25.05 | Silkeborg-Herfølge |

**Støðan, danska superligan**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Herfølge | 31 | 16 - 6 - 9 | 50 | 47 | 3 | 54 |
| 2 | Brøndby | 31 | 14 - 9 - 8 | 55 | 35 | 20 | 51 |
| 3 | AaB | 31 | 12 - 12 - 7 | 56 | 38 | 18 | 48 |
| 4 | AB | 31 | 12 - 10 - 9 | 48 | 35 | 13 | 46 |
| 5 | Viborg | 31 | 13 - 7 - 11 | 49 | 50 | -1 | 46 |
| 6 | Silkeborg | 31 | 12 - 9 - 10 | 45 | 32 | 13 | 45 |
| 7 | Lyngby | 31 | 13 - 5 - 13 | 49 | 52 | -3 | 44 |
| 8 | FCK | 31 | 12 - 7 - 12 | 42 | 34 | 8 | 43 |
| 9 | OB | 31 | 9 - 10 - 12 | 37 | 43 | -6 | 37 |
| 10 | AGF | 31 | 9 - 8 - 14 | 35 | 50 | -15 | 35 |
| 11 | Vejle | 30 | 6 - 11 - 13 | 36 | 63 | -27 | 29 |
| 12 | Esbjerg | 30 | 8 - 4 - 18 | 38 | 61 | -23 | 28 |